# UPPSKOT UM NÝGGJAN ÚTROKNINGARHÁTT TIL LØGTINGSVAL

Í hesum skjali verður lagt fram uppskot um ein nýggjan útrokningarhátt til løgtingsval. Her verður roknað við óbroyttari valdømisskipan, men uppskotið kann eisini nýtast, um t.d. færri valdømi verða. Verður landið skipað í eittans valdømi, hevur hetta uppskot minni týdning.

Í høvuðsheitum byggir uppskotið á hesar meginreglur

A. lutfalsliga býtið av tingsessum flokkanna millum er í best møguligum samsvari við atkvøðubýtið hjá flokkunum, og tað eigur ikki at koma fyri, at raðfylgjan í tingsessum hjá tveimum flokkum er í øvutari raðfylgju í atkvøðum hjá somu flokkum
B. lutfalsliga býtið av tingsessum út á valdømini er í best møguligum samsvari við fólkatalið í valdømunum, tó so at eitthvørt valdømi fær í minsta lagi ein tingsess
C. ein tinggátt er ásett, soleiðis, at ein flokkur, sum samanlagt fyri alt landið fær færri atkvøður enn tað, sum svarar til ein tingsess, fær ikki umboð á ting

Við galdandi vallóg er tað komið fyri fleiri ferðir, eitt nú til løgtingsvalið í 2004, at meginregla A ikki er hildin. Meginregla B um eitt lutfalsligt býtið út á valdømini hevur verið trupul at halda seinnu árini við teimum fólkatalsbroytingum, sum hava verið síðani 1978, tá ið valdømisbýtið í vallógini varð ásett seinast.

Í útrokningini við galdandi vallóg eru tvey atskild høvuðsumfør: fyrst verða valdømisumboðini funnin, og harnæst verða eykaumboðini funnin. Loftið í vallógini upp á 5 eykaumboð hevur á fleiri valum verið væl lægri enn hvat tað átti at verið, um gott samsvar skal vera millum atkvøðubýtið og býtið av tingsessum, t.d. áttu at verið 10 eykaumboð á valunum í 2004 og í 1998.

Við tí nýggja útrokningarháttinum verður útrokningin gjørd í trimum umførum, sum tryggjar, at meginreglurnar omanfyri verða hildnar:

1. býtið av tingsessum út á valdømini verður funnið (kann gerast áðrenn valið)
2. býtið av tingsessum flokkanna millum verður funnið (út frá floksatkvøðunum)
3. tingsessirnir fyri hvønn flokk í øllum valdømum verða funnir

Á síðu 2 er ein skitsa til ítøkiliga orðing av tí nýggja útrokningarháttinum. Skitsan er skipað í sjey greinir, og við hvørja grein er ein viðmerking. Tey valtøkniligu hugtøkini, ið verða nevnd í greinunum, eru vælkend og allýst í valskipanarfrøðini. Sí [1].

Á síðu 3 er nýggi útrokningarhátturin brúktur upp á atkvøðutølini frá løgtingsvalinum í 2004 og samanborin við úrslitið sambært galdandi vallóg við hesi broyting: roknað verður við 6 eykaumboðum fyri at fáa 33 tingsessir tilsamans eins og í uppskotinum.

Á síðu 4 er dømi um eitt tilgjørt valúrslit, har galdandi vallóg virkar stak illa. Dømið er tikið úr [2].

Petur Zachariassen, hagfrøðingur
Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya

29. september 2005

[1] Petur Zachariassen og Martin Zachariassen: *Frá atkvøðum til tingsessir – samanbering av hættum til útrokning av tingmannabýti.* Tøknifrágreiðing, NVD-rit, 2005-1.
Kann takast niður á http://www.nvd.fo/fileadmin/Myndir/PZ/Valtol/NVDrit2005-1.pdf
[2] Petur Zachariassen: *Val, val, val – nú tingið mannast skal.* Frøði 1, 2005

## SKITSA TIL ORÐING AV NÝGGJUM ÚTROKNINGARHÁTTI TIL LØGTINGSVAL

| | | **Viðmerkingar** |
|---|---|---|
| 1 | Á Føroya løgtingi eru 33 tingsessir. | Stýrisskipanarlógin loyvir upp til 33 tingsessir, og parlamentariskt er tað ruddiligari at hava eitt fast ólíka tal av tingsessum. Nýggi útrokningarhátturin leggur ikki upp til at hava møguleika fyri skiftandi tali av tingsessum sum í galdandi vallóg. |
| 2 | Undan eitt løgtingsval velur løgtingið/landsstýrið eina ’meginvalnevnd’ til at standa fyri fyrireiking og uppgerð av løgtingsvalinum. | Tað eigur at verða umhugsað at hava eina serstaka nevnd, sum – saman við miðfyrisitingini – m.a. kann samskipa valfyrireikingar, standa fyri uppgerðini av valinum, lofta ivamálum og fyriskipa lutakast, um javnvág kemur fyri. Við tí nýggja útrokningarháttinum koma verandi løgtingsvalnevndir í valdømunum ikki at vera uppi í uppgerðini av valinum. |
| 3 | Uppstilling og atkvøðugreiðsla til løgtingsval verða skipað í hesi valdømi: Norðoya, Eysturoyar, Norðstreymoyar, Suðurstreymoyar, Vága, Sandoyar og Suðuroyar valdømi. | Talið av valdømum er ikki avgerandi fyri nýggja útrokningarháttin. Henda greinin kundi í staðin t.d. víst til eina kunngerð, har ið valdømini verða ásett. Verður talan um at skipa landið í *eitt* valdømi, eru greinirnar 4 og 6 ikki neyðugar. |
| 4 | Býtið av tingsessum út á valdømini verður ásett soleiðis:<br>a. øll valdømini fáa í minsta lagi 1 tingsess<br>b. útjavnandi Sainte-Laguë hátturin verður brúktur við støði í fólkatalinum í valdømunum 1. januar í valárinum | Við hesi mannagongd lagar býtið av tingsessum út á valdømini seg eftir fólkatalsbroytingunum og tryggjar, at meginregla B verður hildin. Hetta býtið kann vera greitt undan valinum. *Útjavnandi* Sainte-Laguë hátturin virkar á tann hátt, at fyrst fáa øll valdømini eitt umboð í part, og hini 26 (=33-7) umboðini verða síðani býtt út við at brúka deilararnar 3, 5, 7, ... eins og í *vanliga* Sainte-Laguë háttinum (sí viðmerking til grein 5). Kravið í stk. a hevur einans týdning, um fólkatalsluturin hjá einum valdømi fer niður á 1-2%. Við núverandi fólkatalið hevur minsta valdømi um 3% – tá geva útjavnandi Sainte-Laguë og vanligi Sainte-Laguë sama úrslit. |
| 5 | Býtið av tingsessum út á uppstillaðu flokkarnar verður ásett sambært hesum reglum:<br>a. flokkar, ið fáa færri enn 3% av atkvøðunum, fáa ongan tingsess<br>b. Sainte-Laguë hátturin verður brúktur, soleiðis at atkvøðurnar hjá flokkum, ið ongan tingsess fáa sambært stk. a., verða ikki taldar við | 3%-tinggáttin í stk. a í hesi grein tryggjar, at meginregla C verður hildin, tí at 3% av 33 tingsessum er 0.99 (nærum 1). Í galdandi vallóg er gáttin 3.7% (1/27) fyri at fáa eykaumboð, og møguleiki er eisini fyri at fáa valdømisumboð uttan at hava rokkið 3.7%-gáttina – hetta er tó ikki komið fyri síðani á løgtingsvalinum í 1954. Stk. b tryggjar, at meginregla A verður hildin. Valskipanarfrøðin hevur staðfest, at Sainte-Laguë hátturin (tann vanligi) við deilarunum 1, 3, 5, ... gevur eitt gott býti; hann ger ikki mun á størri og smærri flokkum (sum d’Hondt hátturin ger) og kann ikki geva øvuta raðfylgju av tingsessum og atkvøðum, sum onkuntíð kemur fyri við galdandi vallóg. Sí keldu [1]. |
| 6 | Býtið av tingsessum hjá teimum flokkum, ið fáa umboð á ting, út á valdømini verður ásett sambært hesum reglum:<br>a. býtið av tingsessum út á valdømini er sum ásett í gr. 4, og býtið av tingsessum út á flokkarnar er sum ásett í gr. 5<br>b. tvílutfalsligi deilarahátturin við vanligari runding (Balinski) verður brúktur | Stk. a í hesi grein staðfestir ásetingarnar í grein 4 og grein 5 um býtini av tingsessum út á ávikavist valdømi og flokkar. Sonevndi Balinski hátturin í stk. b byggir á tað ástøðiliga úrslit, at har finst júst *ein* loysn at býta tingsessirnar út á flokkar og valdømi við givnu treytunum í stk. a, uttan so, at ein javnvág kemur fyri. Mannagongdir og telduforrit eru tøk til at finna nevndu loysn. Eftirgerðir av løgtingsvalunum 1978-2004 staðfesta, at við Balinski háttinum fæst sum heild eitt betri úrslit – mett eftir meginreglunum A-C – enn við galdandi vallóg. Sí keldu [1]. |
| 7 | Um javnvág er í útrokningini í gr. 4., 5. ella 6. skipar meginvalnevndin fyri lutakasti eftir nærri ásettum reglum. | Við hesum nýggja útrokningarhátti – eins og við galdandi vallóg – kunnu javnvágir koma fyri, sum krevja lutakast. Hetta kann koma fyri, hóast sannlíkindini eru evarska smá (t.d. mátti eitt lutakast til við løgtingsvalið í 1990 fyri at fáa avgjørt, hvat av tveimum valdømum átti eitt eykaumboð hjá einum flokki). |

## BÝTIÐ AV TINGSESSUM VIÐ NÝGGJA ÚTROKNINGARHÁTTINUM OG VIÐ GALDANDI VALLÓG (2004 løgtingsvalið og 33 tingsessir)

Talvan niðanfyri vísir býtið av tingsessum við nýggja útrokningarháttinum (feitaru tølini vinstrumegin í hvørjum teigi) og við galdandi vallóg við 6 eykaumboðum (tølini høgrumegin). Har sum munur er á tølunum, er bakgrundin grá. Í mun til veruliga valúrslitið fær listi B við galdandi vallóg í hesari talvuni triðvalda tinglimin í Suðurstreymoyar valdømi aftrat (sum tað 6. eykaumboðið).

| Listi | NO | | EY | | NS | | SS | | VA | | SA | | SU | | Tils. | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| A | **1** | 2 | **1** | 1 | **1** | 1 | **2** | 2 | **1** | 1 | | | **1** | | **7** | 7 |
| B | **1** | | **2** | 2 | **1** | 1 | **2** | 3 | **1** | 1 | | | **1** | 1 | **8** | 8 |
| C | **1** | 1 | **1** | 1 | | | **3** | 2 | | | **1** | 1 | **1** | 2 | **7** | 7 |
| D | | | **1** | 1 | | | **1** | | | | | | | | **2** | 1 |
| E | **1** | 1 | **1** | 1 | **1** | 1 | **3** | 3 | | | | 1 | **1** | 1 | **7** | 8 |
| H | | | **1** | 1 | | | **1** | 1 | | | | | | | **2** | 2 |
| G | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Tils. | **4** | 4 | **7** | 7 | **3** | 3 | **12** | 11 | **2** | 2 | **1** | 2 | **4** | 4 | **33** | 33 |

(nýggi útrokn. hátturin → feitaru tølini; galdandi vallóg → tølini høgrumegin)

Broytingarnar í hesum báðum býtum – frá galdandi vallóg til nýggjan útrokningarhátt – eru:

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Listi A | í NO: | næstvaldi ikki á ting | Listi C | í SS: | triðvaldi á ting |
| Listi A | í SU: | fyrstvaldi á ting | Listi C | í SU: | næstvaldi ikki á ting |
| Listi B | í NO: | fyrstvaldi á ting | Listi D | í SS: | fyrstvaldi á ting |
| Listi B | í SS: | triðvaldi ikki á ting | Listi E | í SA: | fyrstvaldi ikki á ting |

sum so gera tað, at býtini út á flokkarnar samanlagt og út á valdømini samanlagt – við nýggja útrokningarháttinum í mun til galdandi vallóg – verða í betri samsvari við atkvøðutølini.

Næsta talvan vísir ***kvoturnar*** fyri hvønn flokkin í øllum valdømum, t.e. tann parturin av 33, sum ein flokkur av røttum 'eigur' í valdøminum sambært atkvøðunum. T.d. fekk listi G 432 atkvøður í Suðurstreymoyar valdømi (SS), sum gevur 432/31711*33 = 0,45 í kvotu (31711 er samlaða talið av atkvøðum á løgtingsvalinum í 2004). Talvan vísir eisini atkvøður fyri hvønn tingsessin.

| Listi | NO | EY | NS | SS | VA | SA | SU | Tils. | Atkv. pr. sess: Nýggjur útr.háttur | Atkv. pr. sess: Gald. vallóg |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| A | 1,49 | 1,27 | 0,55 | 2,12 | 0,55 | 0,27 | 0,54 | 6,80 | 933 | 933 |
| B | 0,63 | 2,09 | 0,69 | 2,75 | 0,69 | 0,11 | 0,85 | 7,81 | 938 | 938 |
| C | 0,77 | 1,30 | 0,51 | 2,36 | 0,39 | 0,34 | 1,53 | 7,20 | 989 | 989 |
| D | 0,27 | 0,55 | 0,06 | 0,55 | 0,04 | 0,02 | 0,02 | 1,52 | 731 | 1461 |
| E | 0,88 | 1,30 | 0,61 | 3,20 | 0,27 | 0,30 | 0,60 | 7,17 | 984 | 861 |
| H | 0,15 | 0,48 | 0,08 | 0,82 | 0,08 | 0,03 | 0,08 | 1,73 | 831 | 831 |
| G | 0,03 | 0,15 | 0,09 | 0,45 | 0,02 | 0,00 | 0,03 | 0,78 | | |
| Tils. | 4,23 | 7,16 | 2,59 | 12,25 | 2,05 | 1,06 | 3,65 | 33,00 | 961 | 961 |
| Nýggjur útr.háttur | 1017 | 982 | 831 | 981 | 987 | 1023 | 877 | | | |
| Gald. vallóg | 1017 | 982 | 831 | 1070 | 987 | 512 | 877 | | | |

Verða kvoturnar fyri sama flokk (ella sama valdømi) samanbornar, sæst, at tað kann koma fyri, at ein minni kvota gevur ein tingsess, samstundis sum ein størri kvota ongan tingsess gevur. T.d. fekk listi C ein tingsess við kvotuni 0,34 (í SA), men ongan tingsess við kvotuni 0,51 (í NS).

## DØMI UM EITT TILGJØRT VALÚRSLIT

### Eitt tilgjørt valúrslit
### – har galdandi vallóg virkar stak illa

Vit hugsa okkum eitt løgtingsval, har 5 flokkar/listar stilla upp: MH ('Móti Havnini') og A-D. Í øllum valdømum uttan Suðurstreymoy (SS) fáa listarnir sama prosentbýtið: 50.5, 12.6, 12.4, 12.3 og 12.2. Í SS er prosentbýtið: 0, 25.5, 25.1, 24.8 og 24.6 . Samlaðu atkvøðurnar í teimum 7 valdømunum eru tær somu sum til løgtingsvalið 2004.

| Valdømi → Listar | NO | EY | NS | SS | VÁ | SA | SU | Lista-kvotur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **MH** | 50.5 | 50.5 | 50.5 | 0 | 50.5 | 50.5 | 50.5 | **10.14** |
| **A** | 12.6 | 12.6 | 12.6 | 25.5 | 12.6 | 12.6 | 12.6 | **5.56** |
| **B** | 12.4 | 12.4 | 12.4 | 25.1 | 12.4 | 12.4 | 12.4 | **5.48** |
| **C** | 12.3 | 12.3 | 12.3 | 24.8 | 12.3 | 12.3 | 12.3 | **5.43** |
| **D** | 12.2 | 12.2 | 12.2 | 24.6 | 12.2 | 12.2 | 12.2 | **5.39** |
| | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | |
| Vald.kvotur | **4.10** | **6.94** | **2.51** | **11.88** | **1.99** | **1.03** | **3.54** | **32** |
| Vald.atkvøður | 4067 | 6876 | 2492 | 11771 | 1973 | 1023 | 3509 | 31711 |

Niðanfyri sæst býtið av tingsessum sambært **galdandi vallóg**; eykaumboðini er markað við +. Listarnir MH og A-D fáa ávikavist 18, 4, 4, 3 og 3 sessir, eitt býti, sum passar stak illa við kvoturnar. Serliga fyri lista MH er munurin stórur – 18 sessir móti kvotuni 10.14 – og orsøkin er, at MH fær allar valdar sum valdømisumboð uttan fyri SS-valdømi. Bert eitt valdømisumboð uttan fyri SS fer til annan lista (til A í EY). Eisini í býtinum upp á valdømi eru skeivleikar, m.a. fær SS við kvotuni 11.88 'einans' 8 umboð, sum øll eru valdømis-umboð. Útrokningin vísir, at fyri at fáa eitt tingmannabýti, sum er í samsvari við atkvøðurnar ella kvoturnar, krevjast 19 eykaumboð, men loftið er sum kunnugt 5.

Galdandi vallóg

| Valdømi → Listar | NO | EY | NS | SS | VÁ | SA | SU | Lista-sessir |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **MH** | **4** | **4** | **2** | | **2** | **2** | **4** | **18** |
| **A** | **+1** | **1** | | **2** | | | | **4** |
| **B** | **+1** | **+1** | | **2** | | | | **4** |
| **C** | | **+1** | | **2** | | | | **3** |
| **D** | | **+1** | | **2** | | | | **3** |
| Vald.sessir | **6** | **8** | **2** | **8** | **2** | **2** | **4** | **32** |

Niðanfyri sæst býtið av tingsessum sambært einum 'tvílutfalsligum' útrokningarhátti nevndur **Balinski** hátturin. Listarnir MH og A-D býti sambært S-Laguë býtisháttinum (sí TALVU 1). Krav er her sett um sama minstatal av umboðum til valdømini, sum vallógin ásetir. Annars er býtið upp á valdømi í góðum samsvari við valdømiskvoturnar.

Balinski

| Valdømi → Listar | NO | EY | NS | SS | VÁ | SA | SU | Lista-sessir |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **MH** | **1** | **3** | **1** | | **1** | **2** | **2** | **10** |
| **A** | | **1** | **1** | **3** | **1** | | | **6** |
| **B** | **1** | **1** | | **3** | | | **1** | **6** |
| **C** | **1** | **1** | | **2** | | | **1** | **5** |
| **D** | **1** | **1** | | **3** | | | | **5** |
| Vald.sessir | **4** | **7** | **2** | **11** | **2** | **2** | **4** | **32** |

Úr greinini: *Val, val, val – nú tingið mannast skal*, Frøði 1, 2005.